# FLIS.FO

Sp/f Flis.fo
Birnugøta 4
Fo-100 Tórshavn
Tlf: 667788

flis@flis.fo
www.flis.fo
Eik: 9181 135.674.9



## Handfaring av greinkvørnini, brúkaravegleiðing og verndar reglur:

- Greinkvørnin er ein góð, men sera vandamikil maskina, um tú ikki fert væl og rætt við henni. Tí muga fylgjandi krøv yvirhaldast:

- ***Brúkið altíð verndarbrillur, hjálm, handskar og oyrnavernd (larmurin er yvir 120DB)***
- ***Nettovekt: 195kg***
- ***Brennievni: Blýfrítt bensin 95 oktan***
- ***Max greinabreidd: 10 cm***
- ***Standið ikki aftanfyri, men við síðurnarav maskinuni, tá fylt verður í.***
- ***Tað er 18 ára aldursmark fyri at brúka greinkvørnina.***

**Fyrireiking:**
- Brillur, hjálmur við oyraverjum og eygnaverju (visir) er krav, og fylgir við maskinuni.
- Klæðir og handskar mugu sita tætt at kroppinum. Eingi leys pløgg, ið kunnu seta seg føst í kvørnina, sosum hálsturrikløð osf.
- Lat ikki óvikomandi sleppa framat maskinuni og arbeiðsøkinum. Stikk ikki armar ella bein í traktina. Børn mugu ikki verða í nánd av kvørnini.
- Lat ikki kvørnina ganga meðan tú fert frá henni - sløkk og tak lykilin við tær.
- Í kvørnini eru tveir hvassir knívar. Gev teim ans. Um tú má reinsa kvørnina so verð í handskum og gáa eftir hvar knívarnir eru.
- Koyr greinarnar í kvørnina ímeðan tú stendur við síðurnar av traktini, sum sæst á myndini. Tað kunnu koma stykkir flúgvandi úr aftur.

**Áðrenn tú fert í gongd:**
- Set kvørnina spakuliga niður á javnt og slatt undirlendi.
- Folda traktina niður har greinarnar skulu í, og kanna at gummiverjurnar hanga javnt fyri knívarnar og eru heilar.
- Tryggja tær at (vanligt) blýfrítt bensin 95 oktan er á tangan.
- Kanna um nokk av olju er á motorinum.
- Er neyðstopp knøtturin úti?
- Kanna eftir at einki er í knívunum, og at kvørnin melur.
- Er okkurt í, ber til at fiska tað upp við einum træpinni.
- Boygg útkastararan, so hann sprænir flisið har tú ynskir - flisið verður sprænt hart út!

**TENDRA:**

- Snara lykilin á ***1***.
- Set bensin kranan lodrætt.
- Set spidaran til ***SLOW*** og hála chokaran út.
- Snara lykilin, so at motorurin startar.
- Trýst chokaran innaftur.
- Set spidaran á ***FAST*** og lat maskinuna hita upp í einar 2-3 minuttir.

**FLISA**

- Kvørnin er gjørd til træ og bert træ. **Ikki til trærøtur, seym, mold, grót osf.**
- Tvørmáti skal ikki vera meir enn 10cm. Tvørmátari er viðheftur á maskinuni.
- Lat maskinuna sleppa at draga greinarnar inn sjálv. Ikki trýsta, tó kann gerast neyðugt at hjálpa til við einium lítlum skumpi. Statt við síðunar av maskinuni.
- Greinarnar mugu verða passaliga beinar, soleiðis at tær ganga lættliga gjøgnum traktina. Krókutar greinar mugu skerast sundur í passalig bein stykkir áðrenn.

**STEÐGA:**

- Trýst reyða knøttin inn.
- Tørna lykilin til 0
- Bíða til knívarnir eru støðgaðir.

**TRUPULLEIKAR:**

- **Um maskinan typpist,** so sløkk beinanvegin. Ikki koyra við typtari kvørn, har kann eldur koma í. Fá flisið úr maskinuni, men ansa eftir hvøssu knívunum.
- **Steðgar maskinan**, er tað oftast neyðstoppknøtturin, ið er trýstur inn av óvart. Knøtturin kann verða trekur at fáa útaftur. Onnur orsøk er, at bensinið er uppi. Kvørnin brúkar vanligt blýfrítt bensin.

  Ivast tú, ring so til okkara á tlf. 667788.

Okkara kæra kvørn er góð og ger eitt gott arbeiði, og vit vilja fegin hava hana í nógv ár. Tí ynskja vit, at øll fara væl um hana - Tað sum henni dámar ringast er, at fáa grót, seymir og annað sum ikki er træ í knívarnar.

Vinarliga
FLIS.fo

Tlf: 667788